# Hepnir í óhappinum

Tveir mans vóru ógvuliga hepnir at sleppa uttan nakran skaða, frá einum ógvusligum ferðsluóhappi omanfyri Kvívík í gjárkvøldi. Klokkan 18.47 ringdu tey úr Kvívík til løgregluna um, at bilurin var farin út av vegnum. Sambært vakthavandi á løgreglustøðini í Havn í morgun, var tað bert tann eini bilurin umfataður av óhappinum. Teir báðir menninir hava verið óansnir eina lítla løtu, og so er bilurin farin sendandi út av vegnum, har hann fór í knús.

*-rólant*



*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Atgongumerkini verða endurgoldin

Eigur tú eitt atgongumerki til eina av konsertunum, sum Michael Jackson, skuldi hava, kanst tú fáa peningin aftur. Tað skrivar Kringvarp Føroya á heimasíðu sínari. Ætlað var, at Michael Jackson eftir drúgvan steðg skuldi fara aftur á pall 13. juli, men kendi poppsangarin doyði brádliga hósdagin. Kringvarpið endurgevur AEG fyri at siga, at fólk kunnu fáa atgongumerkini endurgoldin fram til 14. august. Vilja tey ikki hava peningin aftur, kunnu tey fáa atgongumerkini at varðveita sum minni.

# Nýggja beinið hjá føroysku vinnuni

**BlueGreenFuture er slóðbrótandi átak, sum ger tað lættari hjá føroyskum fyritøkum at fáa vinnuliga úrtøku burtur úr skjótast vaksandi vinnuøkinum í alheims búskapinum, Cleantech, sigur Andras Róin, projektleiðari í BlueGreenFuture. Hann metir, at Cleentech kann gerast hitt beinið, føroyskt vinnulív hevur saknað**

**CLEENTECH**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*




*Bluegreenfuture.com er heitið á heimasíðuni, sum savnar allar upplýsingarnar um nýggja átakið og um Cleentech*

Í tíðindaskrivi, BlueGreenFuture sendi út í morgun, stendur um átaki, at BlueGreen vendir sær beinleiðis til føroysku vinnuna. Endamálið er at samskipa og marknaðarføra føroyska tøkni og føroyskar loysnir innan Cleantech fram í móti veðurlagsráðstevnuni, sum verður í Keypmannahavn desember.

Við øðrum orðum vil BlueGreenFuture skapa eitt netverk av veitarum, sum hava útflutning og Cleantech til felags og harvið gera tað lættari at koma í samband við altjóða marknaðin.

– BlueGreenFuture skal savna alt undir sama regnskjóli og sameina, marknaðarføra og ráðgeva føroyskum fyritøkum á hesum økinum, sigur Andras Róin, projektleiðari.

Hann vísir á, at ein einstøk fyritøka ella ein einstakur persónur sjáldan munar nakað á altjóða pallinum, og tískil koma Føroyar og føroyskar fyritøkur at standa sterkari undir nýggja átakinum.

> **CLEENTECH**
> **Clentech er altjóða felagsheitið fyri tøkni og loysnir, sum spara um orkunýtslu og minka um skaðilig umhvørvisárin**

## Serligar føroyskar fortreytir

Enn er Cleentech í mangar mátar eitt lítið ítøkiligt hugtak. Men fyri at lýsa evni, tekur Andras Róin hetta dømið fram.

– Um eini tvey ella trý ár skulu allar heimsins fyritøkur helst halda nakrar ávísar CO2-kvotur. Hetta kemur eisini at vera galdandi hjá Atlantic Airways, Smyril Line, Havsbrún og hinum føroysku fyritøkunum. Halda fyritøkurnar ikki CO2-kvoturnar, mugu tær keypa størri kvotur, greiðir Andras Róin frá.

– Felagsheitið millum hetta dømi og BlueGreenFuture, er Cleentech, og har hava Føroyar serligar fortreytir fyri at vera við millum tey allar fremstu á økinum, sigur hann.

Í hesum sambandinum nevnir Andras Róin Injector Doors og Decision 3 sum tvey dømi, um føroyskar fyritøkur, ið hava ment orkusparandi útgerð.

Í tíðindaskrivinum frá BlueGreenFuture verður eisini víst á, at altjóða marknaðurin krevur umhvørvisvinarliga og burðardygga framleiðslu. Tí er Cleentech bæði umhvørvisliga og samfelagsliga rætta leiðin og ein stórur vinnuligur møguleiki, sum kann geva okkara búskapi fleiri bein at standa á. – Fyri at seta tingini í perspektiv kann eg siga, at eg persónliga meti, at Cleentech verður minst líka stórt sum KT er í dag, sigur Andras Róin, projektleiðari í BlueGreenFuture.

# 100 børn fingið tak

**Stovnurin í Kvívík, sum skal fevna um vøggustovu, barnagarð og frítíðarskúla, varð reistur í gjár**

**BYGGING**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Gongst sum ætlað, verður stovnurin tikin í nýstlu í mars næsta ár.

– Vit halda tíðarætlanina og eru næstan ajour, sigur Grækaris A. Joensen, byggimeistari.

Hann sigur, at teir í morgun fóru undir at tróðra og til ólavsøku er ætlanin, at flag skal liggja á.

## Neyðugt og ráðiligt

Tað er ikki hissini verkætlanan, ið hann og fyritøka hansara, GAJ Smíð, eru farnir undir. Stovnurin er í tveimum hæddum, skal rúma 100 børnum – alt frá vøggustovu og barnagarði til frítíðarskúla – og kemur at kosta 22 milliónir krónur.

Borgarstjórin í Kvívík, Dánjal Petur Müller, hevur áður sagt við Sosialin, at hóast talan er um ein stóra íløgu hjá kommununi, so er tað bæði neyðugt og fíggjarliga ráðiligt við einari íløgu av hesum slagnum.

Vøggustova, barnagarður og frítíðarskúla húsast sum er í trimum ymsum hølum, og eru 70 børn knýtt at skipanini.

Hvat fíggjarliga partinum viðvíkur, skyldar Kvívíkar kommuna einki. Av teimum 22 milliónunum skulu 16 milliónir lænast. Tað er ein sløk álíkning, tí inntøkan hjá kommununi av skatti og øðrum, verður 19 milliónir og í ár.

So hóast lántøkuna til stovnin, kemur kommunan ikki upp undir lógarkravda hámarkið fyri, hvussu nógv ein kommuna kann skylda, tí tað markið er ein álíkning.



*Stóri stovnurin varð reistur í gjár, í dag verður tróðra og til ólavsøku skal flag liggja á bygninginum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*